tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið 2025-2028

**Dagfesting:** 30.01.2025 kl. 17:00
**Málnr.:**

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Tóki Wiberg Justinussen, Barbara Michalina Tausen, Bjarni Hammer, Eyð Jóna Eidesgaard, Arnfinn Bech

Varalimir: Tóki Wiberg Justinussen

Ikki møtt: Alvi Mortensen

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 1/25 | 24/00374-2 | Fundarskipan fyri Tvøroyrar býráð |
| 2/25 | 24/00375-1 | Kommunustýrisskipan fyri Tvøroyrar kommunu 2025- |
| 3/25 | 24/00307-14 | Umsókn um frávik frá byggisamtyktini - matr. nr. 38v í Trongisvági |
| 4/25 | 24/00346-4 | Tilboð um at yvirtaka Vípuveg - og keypa 340m2 |
| 5/25 | 25/00014-2 | Kavaruddari til teknisku deild |
| 6/25 | 25/00046-1 | Heimild, at skriva undir skjøl vegna Tvøroyrar kommunu sambært § 44, stk. 2 í kommunustýrislógini |
| 7/25 | 24/00189-2 | SEV -Hoyring um nýggjan leiðslubygnað í SEV |
| 8/25 | 25/00037-2 | Kommunufelagið -skeiðs ferð til Íslands feb. 2025 |
| **Til kunningar** | | |
| 1/25 | 25/00029-1 | Skattainntøkur 2025 |
| 2/25 | 25/00039-1 | Hoyring -Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjófeingi (Sjófeingislógin) |
| 3/25 | 25/00044-2 | Føroya Banki -leiga av avgreiðsluhølum á Sjógøtu 2 |
| | | |

Kristin Michelsen, borgarstjóri lesur skránna til fundin í dag og spyr um viðmerkingar eru til skránna – **Ongin viðmerking.**

Kristin Michelsen, borgarstjóri setur fundin, og kunnar um, at Alvi Mortensen hevur fráboðað, at honum berst frá at møta til býráðsfundin í dag 30. Januar 2025, og hevur hann heitt á Tóka Wiberg Justinussen, ið er fyrst valdi varalimur á lista T felagslistanum til kommunustýrisvalið 20. november 2024, um at møta fyri seg. Tóki Justinussen hevur ikki havt sæti í býráðnum, og verður heitt á býráðið um at atkvøða hvørt Tóki Justinussen kann taka sæti í býráðnum til fundin í dag 30. Januar 2025. **Einmælt samtykt.**

**Til støðutakan**

## 1/25
## 24/00374-2 Fundarskipan fyri Tvøroyrar býráð

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 2 Býráðið 2025-2028 | 30.01.2025 | 1/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin**
Samb. kommunustýrislógina skal ein fundarskipa samtykkjast fyri kommunustýrið

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg um kommunustýri, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 59 frá 22. mai 2023, (Kommunustýrislógin).

> ***§ 5.*** *Kommunustýrið skal áseta nærri reglur um síni stýrisviðurskifti í eini kommunustýrisskipan. Uppskot og broytingaruppskot til kommunustýrisskipan skulu hava tvær viðgerðir við í minsta lagi 14 daga millumbili.*
>
> *Stk. 3. Kommunustýrið skal áseta nærri reglur um sína málsmannagongd í eini fundarskipan.*

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar

**Tilmælið:**
Uppskot til fundarskipan fyri kommunustýrið setuna 2025-2028 verður við hesum latið býráðnum til støðutakan.

**Býráðið 28. december 2024:**
Málið verður útsett til næsta fund.

**Býráðið 2025-2028 30. januar 2025:**
Einmælt samtykt at býráðslimir lata inn broytingaruppskot til fundarskipan seinast 10. feb. 2025, og at fundarskipanin verður viðgjørd á fyrst komandi býráðsfundi.

**2/25**
**24/00375-1 Kommunustýrisskipan fyri Tvøroyrar kommunu 2025-**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið 2025-2028 | 30.01.2025 | 2/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin**
Samb. kommunustýrislógina skal ein kommunustýrisskipan samtykkjast fyri kommunustýrið

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg um kommunustýri, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 59 frá 22. mai 2023, (Kommunustýrislógin).

> ***§ 5.** Kommunustýrið skal áseta nærri reglur um síni stýrisviðurskifti í eini kommunustýrisskipan. Uppskot og broytingaruppskot til kommunustýrisskipan skulu hava tvær viðgerðir við í minsta lagi 14 daga millumbili.*

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar

**Tilmælið:**
Uppskot til kommunustýrisskipan fyri setuna 2025-2028 verður við hesum latið býráðnum til støðutakan.

**Býráðið 2025-2028 30. januar 2025:**
Einmælt samtykt at býráðslimir lata inn broytingaruppskot til kommunustýrisskipan seinast 10. feb. 2025, og at kommstýrisskipanin verður viðgjørd á fyrst komandi býráðsfundi.

**3/25**
**24/00307-14 Umsókn um frávik frá byggisamtyktini - matr. nr. 38v í Trongisvági**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd 2025-2028 | 08.01.2025 | 3/25 |
| 2 Býráðið 2025-2028 | 30.01.2025 | 3/25 |

**Málslýsing:**
[redacted] hava fingið teknað eini sethús, ið eru ov stór til ynsktu staðseting, og sum koma ov nær markinum.

Tey søkja um frávik frá ásetingunum í byggisamtyktini í mun til frástøðu til grannamark.

Skrivliga umsóknin umfatar frávik í mun til markið móti grannanum eystanfyri, og markið móti kommununalum matriklum: ánni litra C. og innkoyringini matr. nr. 38x, sum kommunan skal yvirtaka. Men eftir at grannin á matr. nr. 38t er komin við sínum hoyringssvari, hevur umsøkjarin gjørt vart við, at tey fara at broyta komandi byggiumsóknina soleiðis, at sethúsini kortini ikki verða bygd nærri enn 2,5 metrar frá matr. nr. 38t.

Fráleikakravið uppá 2,5m er umtalað í Bygningskunngerðini BK17 í 2.2.3.2 Einbýlishús og tvíhús. Hetta er sostatt eitt grundleggjandi krav í Føroyum, sum tó kann tillagast í byggisamtyktum fyri ávís øki.

Í byggisamtyktini fyri Tvøroyrar Kommunu stendur eisini, at "í øllum økjum, uttan miðbýarøkið, skulu allar byggingar standa fyri seg t.e. í minsta lagi 2,5 m frá markinum."
Sí: § 13. Viðvíkjandi hæddar- og frástøðuviðurskiftum húsanna

§ 10. Undantaksloyvi í byggisamtyktini sigur:
"1) Tá ið umráðandi grundir mæla til tess, ella har tað snýr seg um mál av lítlum týdningi og tá ið byggifulltrúin hevur viðmælt umsóknini, kann byggimyndugleikin eftir umstøðum og gjøllari settum treytum loyva, at vikið verður frá ásetingunum í hesi byggisamtykt.

2) Áðrenn undantaksloyvi verður givið, skal boð sendast grannunum skrivliga, og skulu teir hava høvi til at kanna umsóknina í minsta lagi í tvær vikur, frá tí teir hava fingið boðini. Møguligar viðmerkingar frá grannum eru vegleiðandi."

**Lógargrundarlag:**
BK 2017
Byggisamtykt fyri Tvøroyrar Kommunu

**Fíggjarligar avleiðingar:**
??

**Tilmælið:**
[redacted]

Samstundis verður mælt til at loyva bygging nærri enn 2,5m móti markinum vestureftir, sum er Svalbarðsá, treytað av, at áarrenslið ikki verður broyt.
Mælt verður eisini  til at minka vegøki 38x uml. 118m2, soleiðis at økið sum í roynd og veru er tún hjá matr. nr. 38v, verður partur av 38v, og tað ger at sethúsini ikki verða bygd í mark til 38x.




**<u>Tekniska nevnd 2025-2028 08. januar 2025:</u>**
Tekniska nevnd tekur undir við tilmælinum frá umsitingini. Einmælt samtykt.

**<u>Býráðið 2025-2028 30. januar 2025:</u>**
Atkvøtt verður um tilmælinum hjá teknisku nevnd og umsitingi.
Fyri eru: Kristin Michelsen, Tóki Justinussen, Anita Vibergsdóttir, Barbara Tausen, Eyð Eidesgaard og Bjarni Hammer
Ímóti: ongin
Blankt: Arnfinn Bech
**Tilmælið hjá teknisku nevnd og umsitingini er harvið samtykt: 6/0/1 (fyri/ímóti/blankt)**

**4/25**
# 24/00346-4 Tilboð um at yvirtaka Vípuveg - og keypa 340m2

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 2 Fíggjarnevndin 2025-2028 | 23.01.2025 | 1/25 |
| 3 Býráðið 2025-2028 | 30.01.2025 | 4/25 |

**Málslýsing:**
Betri Heim hevur sent kommununi eina fyrispurning um hon er áhugað í at keypa Vípuveg.
Eftirfylgjandi hava vit havt vitjan av Haldis Jensen, sum hevur arvað vegin, og hon mælir til, at kommunan yvirtekur vegin ókeypis, men at hon keypir tey uml. 340 m2, sum eisini eru partur av matr. nr. 559d. Sum ein annar møguleiki ynskir hon, at tey 340 m2 verða løgd saman við matr. nr. 559e.
Trupulleikin er tó, at økið í byggisamtyktini er ætlað til veg. Tað merkir, at vil kommunan ikki keypa tey 340 m2, so krevur tað, at byggisamtyktin verður broytt, annars kann tað ikki verða matrikulerað frá.

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg nr. 64 frá 11. desember 1962 um matrikulering og sundurbýti v.m.
Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:**
Mælt verður til at yvirtaka Vípuveg og at keypa 340 m2.
Fígging til at keypa smástykkir er til staðar í FÆ24.

**Tekniska nevnd 04. december 2024:**
Tekniska nevnd tekur undir við tilmælinum frá teknisku deild um at yvirtaka tann partin av Vípuvegi, sum víst verður til, og at keypa teir írestandi 340 $m^2$ av matr.nr. 559d fyri ikki meira enn [redacted] fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 2025-2028 23. januar 2025:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá teknisku nevnd.

**Býráðið 2025-2028 30. januar 2025:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini og teknisku nevnd

**5/25**
**25/00014-2 Kavaruddari til teknisku deild**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd 2025-2028 | 08.01.2025 | 2/25 |
| 2 Fíggjarnevndin 2025-2028 | 23.01.2025 | 3/25 |
| 3 Býráðið 2025-2028 | 30.01.2025 | 5/25 |

**Málslýsing: Tekniski leiðarin 07.01.2025:**
Mælt verður til, at tekniska deild útvegar sær ein kavaruddara til at rudda gongubreytir og onnur kommunal økir. Tekniska deild hevur innheintað tilboð frá veitara, og samskift við aðrar kommunur, sum hava góðar royndir av slíkari útgerð.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Peningur er ikki avsettur á fíggjarætlanini fyri 2025 á konto §629 Maskinur og bilar. Mælt verður til at fíggja keypið av konto §625 Bygging og løguframleiðsla ella við at veita eykajáttan á konto §629.

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið teknisku nevnd og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Tekniska nevnd 2025-2028 08. januar 2025:**
Nevndin mælir til at keypa kavaruddaran við útgerð samsvarandi fyriliggjandi tilboðið. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 2025-2028 23. januar 2025:**
Einmælt tilmælið hjá teknisku nevnd og at játtan verður av §629 Maskinur og bilar.

**Býráðið 2025-2028 30. januar 2025:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá teknisku nevnd og fíggjarnevndini.

**6/25**
**25/00046-1 Heimild, at skriva undir skjøl vegna Tvøroyrar kommunu sambært § 44, stk. 2 í kommunustýrislógini**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið 2025-2028 | 30.01.2025 | 6/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 27.01.2025**
Vísandi til §44 í kommunustýrislógini, verður mælt til, at heimila einum persóni í umsitingini at undirskriva skjøl viðvíkjandi keypi og sølu av fastari ogn, leigusáttmálar, lániskjøl, setanarbrøv o.t. kommunurnar vegna, saman við borgarstjóranum valskeiðið 1. januar 2025 til 31. desember 2028.

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri (Kommunustýrislógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 71 frá 6. mai 2003.

> *§ 44. Føst ogn hjá kommununi má ikki seljast, uttan so, at ognin frammanundan hevur verið boðin út alment. Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um mannagongdina við almennum útboði umframt reglur um, at ávísar ognir kunnu undantakast almennum útboði. Stk. 2. Skjøl viðvíkjandi keypi og sølu av fastari ogn o.t. skulu verða undirskrivað av borgarstjóranum og einum persóni, sum kommunustýrið hevur heimilað til tess.*

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til støðutakan.

**Býráðið 2025-2028 30. januar 2025:**
Borgarstjórin mælir til at kommunustjórin fær heimild saman við borgarstjóranum at undirskriva skjøl samsv. kommunustýrsilógini §44, stk. 44. **Einmælt samtykt.**

## 7/25
## 24/00189-2 SEV -Hoyring um nýggjan leiðslubygnað í SEV

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 3 Býráðið 2025-2028 | 30.01.2025 | 7/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 26.06.2024**
Umsitingin hevur hin 24. juni móttikið teldupost frá løgf. hjá Kommunufelagnum við hoyring um nýggjan leiðslubygnað í SEV.

**Lógargrundarlag:** Løgtingslóg nr. 59 frá 7. juni 2007 um um el og fjarhita, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 67 frá 30. mai 2024 - (Elveitingarlógin)

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 27. juni 2024:**
Fíggjarnevndin tekur einmælt undir við nýggja leiðslubygnaðinum hjá SEV. -Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 27. juni 2024:**
Borgarstjórin kunnar um ætlanina at broyta leiðslubygnaðin hjá SEV. Tvøroyrar býráð tekur einmælt undir við nýggja leiðslubygnaðinum hjá SEV.

**Kommunustjórin 27.01.2025:**
Borgarstjórin ynskir at býráðið viðgerð og tekur støðu til ætlanina at broyta leiðslubygnaðin hjá SEV, har borgarstjórin í tí størstu kommununi í hvørjari sýslu verða stýrislimir í SEV. Undantak er, at Tórshavnar kommuna velur eitt umboð millum býráðslimir.

**Býráðið 2025-2028 30. januar 2025:**
Atkvøtt verður um tilmælið at fremja broytingar í leiðslubygnaðin hjá SEV, har borgarstjórin í teimum størstu kommununum í hvørjari sýslu sær verða stýrislimir í SEV, tó við undan tak um, at Tórshavnar kommuna velur umboð millum teirra býráðslimir.

**Fyri eru:** Kristin Michelsen, Tóki Justinussen, Anita Vibergsdóttir, Barbara Tausen, Eyð Eidesgaard og Bjarni Hammer
**Ímóti:** ongin
**Blankt:** Arnfinn Bech
**Tilmælið um at fremja broytingar í leiðslubygnaðin hjá SEV samtykt: 6/0/1 (fyri/ímóti/blankt)**

**8/25**
**25/00037-2 Kommunufelagið -skeiðsferð til Íslands feb. 2025**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin 2025-2028 | 23.01.2025 | 5/25 |
| 2 Býráðið 2025-2028 | 30.01.2025 | 8/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 18.01.2025**
Kommunufelagið skipar fyri skeiðsferð til Íslands í døgunum 17.-20- feb. 2025 fyri allar kommunustýrislimir í Føroyum.

Kommunufelagið kunngerð at:

> *Kommunufelagið skipar fyri ferð til Íslands mánadagin 17. Februar. Eftir ætlan verður flogið heimaftur tann 20 februar. Túrurin er fyri allar kommunustýrislimir umframt hægsta fyrisitingarleiðara í kommununi. ( Komunustjóri/skrivari). Ætlanin er at hava skeiðsvirksemi í 2½ dag. Samlaði kostnaðurin pr. Persón er góðar 10.000 kr. , alt íroknað. Fyribils skrá verður tøk seinni í vikuni. Gott um hvør einstøk kommuna kundi melda aftur tal av luttakarum í seinast lagi komandi mánadag 20 januar.*

Mælt verður til at allir býráðslimir hjá Tvøroyrar kommunu fáa møguleika til at luttaka.

**Lógargrundarlag:**
Kommunustýrislógin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Mælt verður til at skeiði verður fíggja av §126, “Samsyningar o.a. til kommunustýrislimir”

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 2025-2028 23. januar 2025:**
Einmælt samtykt at býráðslimir og kommunustjórin fáa tilboð at luttaka á skeiðinum, sum kommunufelagið skipar fyri 17-20. feb. í Íslandi.

**Kommunustjórin 23. Januar 2025:**
Allir 7. býráðslimir hava fráboða luttøk.

**Býráðið 2025-2028 30. januar 2025:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini.

**Til kunningar**

## 1/25
## 25/00029-1 Skattainntøkur 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin 2025-2028 | 23.01.2025 | 4/25 |
| 2 Býráðið 2025-2028 | 30.01.2025 | 1/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 15.01.2025**
Til kunning og umrøðu samanbering av skattainntøkum 2024/2025

**Lógargrundarlag:** Kommunustýrislógin

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2025/2026

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og býráðnum til kunning og umrøðu.

**Fíggjarnevndin 2025-2028 23. januar 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 2025-2028 30. januar 2025:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**2/25**
**25/00039-1 Hoyring -Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjófeingi (Sjófeingislógin)**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið 2025-2028 | 30.01.2025 | 2/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 20.02.2025**
Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið hevur sent til almenna hoyring uppskot til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjófeingi (Sjófeingislógin) -*Ognarviðurskifti, miðsavning, javnseting, økt tilfeingi og landingartreytir*

Borgarstjórin hevur heitt á kommunustjóran, um at orða hoyringarskriv, sum skal sendast til Fiskivinnu- og samferðslumálaráði um broyting í Løgtingslóg um sjófeingi (Sjófeingislógin). Borgarstjórin metur, at her er talan um eina lógarbroyting, ið kann fáa stórar avleiðingar fyri lokalu fiskivinnuna á landi, sum Tvøroyrar býráð skal gera vart við og viðmerkja.

Talan er um skund mál at avgreiða, við tað at svarfreistin er úti í dag 20. jan. Málið verður fyri fyrst avgreitt samsv. heimild hjá borgarstjóranum §21, stk3. í kommunustýrislógini, og eftirfylgjandi á býráðsfundi 30. Januar.

Kommunustýrislógin
§ 21. Stk. 3. Borgarstjórin kann taka avgerð í málum, ið ikki tola at bíða ella har ongin orsøk er til iva.

**Lógargrundarlag:**
Sjófeingislógin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Minni skattainntøkur hjá kommununi

**Tilmælið:**
Tvøroyrar býráð mælir staðiliga frá at broyta lógina við niðanfyri orðing:

- *Kravið um landing í Føroyum verður broytt soleiðis, at loyvt verður at landa helvtina av veiðuni av svartkjafti, makreli ella norðhavssild uttanlands.*

Tvøroyrar býráð mælir staðiliga til heldur at halda fast um verandi orðing í løgtingslóg um sjófeingi, har í kravið um landing og avreiðing í Føroyum er ásett, *at øll veiða hjá føroyskum skipum skal landast og avreiðast um bryggjukant í Føroyum. Tó kunnu 15% av veiðuni fyri hvørt fiskaslag landast og avreiðast uttanlands*

Borgarstjórin mælir býráðnum til at taka undir við ummælisskrivinum, ið er sent til Fiskivinnu- og samferðslumálaráðið hin 20. Jan. Hetta grunda á, at ætlaða broytingin fær stórar neiligar avleiðingar fyri allar kommunur í Suðuroynni. Tørvur er á støðufesti kring okkara tíðandi og avgerðandi fiskivinnu á landi í Suðuroynni og serliga í Tvøroyrar kommunu.

Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til kunning og støðutakan.

**Býráðið 2025-2028 30. januar 2025:**
Umrøtt og kunnað uttan viðmerkingar -býráðið tekur einmælt undir við ummælisskrivinum hjá umsitingini.

## 3/25
## 25/00044-2 Føroya Banki -leiga av avgreiðsluhølum á Sjógøtu 2

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin 2025-2028 | 23.01.2025 | 8/25 |
| 2 Býráðið 2025-2028 | 30.01.2025 | 3/25 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 23.01.2025**
Umsitingin hevur fingið fyrisp. frá Føroya Banka um leigu av avgreiðsluhølinum -har Posta var- á Sjógøtu 2, fyribils í uml.6. mðr. Føroya Banki ynskir at nýta hesi hølir ímeðan verandi hølir hjá bankanum verða umvæld og dagførd.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:**
Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 2025-2028 23. januar 2025:**
Einmælt samtykt at ganga umsóknini hjá Føroya Banka á møti og at áseta eitt leigugjald á [redacted]g [redacted]erður heimila at orðar ein leigusáttmála samsvarandi hesum.

**Býráðið 2025-2028 30. januar 2025:**
Málið var umrøtt, kunnað. Býráðið tekur einmælt undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

Fundurin lokin kl. 18:30

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Tóki W. Justinussen

Barbara Michalina Tausen

Bjarni Hammer

Eyð Jóna Eidesgaard

Arnfinn Bech